# Journalistiska frælsið ikki til sølu

HEINI GAARD
Formaður í Føroya Blaðmannafelag

Tað skal við hesum brævi vera gjørt púra greitt, at Blaðmannafelagið hevur sama sjónarmið og stuðlar tíðindadeildini hjá Sjónvarpinum og leiðsluni í Kringvarpi Føroya, í sáttmálaósemjuni millum Kringvarpið aðrumeðin og ÍSF of FSF hinumegin.

Journalistiska frælsið er ikki til sølu. Hvørki í ítrótti ella í øðrum av lívsins viðurskiftum.

Journalistikkur er millum mangt annað rætturin og ábyrgdin hjá journalistinum, til eina og hvørja tíð sjálvur at avgera, hvat er vert at kasta ljós á og hvussu hetta verður gjørt. Tað er sjálvandi eisini galdandi í fótbólti.

At krevja, at samrøður við leikarar og venjarar skulu gerast á einum ávísum staði, við ávísar frammanundan valdar persónar og einans við frammanundan umbidnum loyvi, er fyri at siga tað bart út eitt sera álvarsligt inntriv í talu- og skrivifrælsi hjá fjølmiðlunum og kann als ikki góðtakast. Tað er eitt grundleggjandi journalistiskt prinsipp, at tað er journalisturin og eingin annar, sum avger, hvussu søgan skal forteljast – tað veri seg við mikrofon, myndatóli ella við penni. Tað eitur í dagligari talu journalistiskt frælsi, um nakar skuldi verið í iva. At ganga við til krøvini í reglugerðini hjá FSF er ein vandamikil glíðubreyt, ið kann enda við, at ítróttarlig, politisk ella fíggjarlig áhugamál diktera, hvat hyggjarin ella lesarin skal hava at vita.

At ÍSF og FSF ikki vilja virða grundleggjandi prinsippir, sum verða hildin høgt í øllum vesturheiminum, er sera óheppið og sigur mest um ÍSF og FSF, sum felagsskapir.

Haraftrat er reglugerðin (sum er gjørd av FSF aftan á, at sáttmálin er undirskrivaður við Kringvarpið) eitt dømi um, at FSF als ikki hevur skil fyri, hvussu ítróttarmiðlar arbeiða. Tað er hinvegin ein roynd at geva ítróttarfeløgunum møguleika fyri at stýra søgunum í miðlunum og fyri at vinna pening upp á senditíðina hjá 3-2.

At til dømis krevja í einari reglugerð - sum FSF ger í hesum máli - at sjónvarpssamrøður skulu verða avtalaðar við felagið framman undan dysti og bert á einum ávísum staði, er burtur úr vón og viti og kann undir ongum umstøðum góðtakast.

VIÐMERKINGAR

# Jógvan og teir gloyma blokkniðurskurðin!!

JOHAN PETERSEN



At blokkniðurskurðurin higartil hevur kostað føroyska samfelagnum tað sama sum ein vágatunnil, ein norðoyatunnil, ein sandoyartunnil og at tað tó hevði verið meiri enn ein hálv milliard eftir til skúla- og heilsuverkið verður ikki nevnt.

Jógvan við Keldu harmast um, at politikarar og greinskrivarar úr høvuðsstaðnum geva útbyggingini av undirstøðukervinum, eitt nú Vágatunlinum, Norðoyatunlinum og einum komandi Sandoyartunli skuldina fyri, at frálæran í fólkaskúlanum hevur ligið vanlagnu, eldrapolitikkurin er á skeivum spori og at hægru skúlarnir, granskingarførleikin, Fróðskaparsetrið og sosialu- og heilsuviðurskiftini í áravís hava fingið ov lítið av peningi.

Ein millión í gjár, eina millión í dag og eina millión krónur í morgin

Men hví nevna Jógvan og teir ikki blokkniðurskurðin? Niðurskurðurin kostaði okkum í gjár eina millión krónur, í dag fer hann at kosta okkum eina millión krónur og í morgin aftur eina millión krónur. Samlað hevur niðurskurðurin higartil kostað føroyska samfelagnum út við 2 milliardir krónur.

Goldið allan Vágatunnilin, allan Norðoyatunnilin og ætlaða Sandoyartunnilin

Hvussu langt hevði hesin peningur rokkið? Jú, hann hevði rokkið at goldið Vágatunnilin allan sum hann er, allan Norðoyatunnilin og allan tann ætlaða Sandoyartunnilin. Jógvan hevði sostatt kunnað koyrt ókeypis gjøgnum Norðoyatunnilin.

Teldur til allar fólkaskúlanæmingar

Og framvegis hevði ein hálv milliard krónur verið eftir til at givið øllum fólkaskúlanæmingum hvør sína farteldu, lærarum eftirútbúgving, nýggjar føroyskar skúlabøkur í staðin fyri tær 20-40 ára gomlu, teimum gomlu sømulig kor, hægru skúlunum betri umstøður og gjørt sosial- og heilsuviðurskiftini tíðarhóskandi.

Hvat kostar Suðuroyartunnilin?

Og tá er ikki roknað við einum multiplikatorvirkningi, sum blokkurin førir við sær, tá ið hall er á fíggjarlógini, sum vit hava havt og framvegis hava. Sambært búskaparfrøðingum er hann upp á uml. 2,5.

Torir nakar at rokna út, hvussu langt blokkniðurskurðurin tá hevði rokkið? Hvussu nógv hevði Suðuroyartunnilin kostað?

# Sletuhundar í Føroyum

ESTER H. HANSEN

Jonna Justinussen skrivar í Dimmalætting 26.mai, eitt sera viðkomandi lesarabræv um sletuhundar í Føroyum. Hon setir spurnartekin við hvat vit skulu við sletuhundum í Føroyum, og viðmerkir um allar teir stakkals Border Collie ið verða nýttir sum (stressaðir) familjuhundar.

Tað ljóðar sum eitt "býtt" hugskot, at hava sletuhund í Føroyum - men, í Danmark og øðrum londum, sum ikki hava nógvan kava, fáa sletuhundar vognar at draga eftir seg. Hetta mugu sletuhundaeigarar hava í huganum, tí um hundurin ikki verður nýttur til endamálið hann er skaptur til, verður tað bert ein stressaður familjuhundur.

Tað skal eisini havast í huga, at sletuhundar eru avlaðir til sera hart veðurlag, tí trívast teir best úti, og skulu helst hava ein góðan hundagarð - men, har kunnu teir ikki "plantast". Teir hava sera nógva orku, og hana mugu teir sleppa av við hvønn dag.

Vit síggja eisini sera nógv "selskaps" hundasløg (s. s. Chiahuahua, Mops, Pekingesarar, King Charles Spaniel O.l.) -hesir hundar krevja selskap! Tað er sera ringt fyri teir, at vera leingi einsamallir heima, meðan familjan er úti og arbeiðir o.a.

Tað kann gerasr ein langur listi yvir ymiskar "rasur", og hvat er týdningarmikið fyri hvørja rasu - men, um tú skalt velja tær ein hund, fá tær nóg mikið av upplýsingum um hann, soleiðis at tú veist, um tú kanst bjóða honum tað hann er ætlaður til - og, at hann fær nóg mikið av motión, og ikki minst, um rasan er "intellegent" má hon eisini sleppa at nýta heilan!

Upplýsingar um hundar fáast á alnótini, í bókum (flestu bókasøvnini eru væl útgjørd við hundabókum), ella til ber at venda sær til hundafelagið, og spyrja hvør rasa passar seg best til tín, og tína familju.

# Býráðslimur argast inn á Asfalt-stuðul

**Tað hevur fingið ilt í Beate L. Samuelsen, býráðslim Sambandsfloksins í Tórshavnar Býráð, at Miðlahúsið hjá Sosialinum var ein av stuðlunum til Asfalt-tiltakið síðsta vikuskiftið**

POLITIKKUR/MIÐLAR
*Eirikur Lindenskov*



*Beate L. Samuelsen, býráðslimur, journalistur og høvuðspartaeigari í P/F Dimmalætting er sera ørg um, at Miðlahúsið var ein av stuðlunum hjá Asfalt*

Umframt at vera stuðul hjá Asfalt, so hýsti Miðlahúsini eisini fleiri av konsertunum.

Niðanfyri prenta vit brot úr greinini, sum Beate L. Samuelsen skrivar í Dimmu í dag. Víst verður eisini til aftursvarið frá Asfalt, sum stendur á Síðu 10 í Sosialinum í dag:

### Vaglið frægari

»Tá eg lat brævbjálvan upp, lógu har tvey hvít atgongumerkir til tónleikatiltøkini í Tórsgøtu, umframt tvey svørt, sum vóru til eitt "after-party" á Hotel Føroyum leygarkvøldið.

Tað er seinna tiltakið, eg ikki kann taka undir við.

Stutt fyri midnátt skuldi ein bussur fara við gestum frá Miðlahúsinum, altso Sosialinum, og niðan til hotellið, upplýsti borgarstjórin Heðin Mortensen fyri mær.

Hetta tiltalaði meg absolutt ikki. Tað gjørdi eg honum eisini greitt beinanvegin.

Hevði bussurin so farið av Vaglinum, av Skálatrøð ella Farstøðini í staðin, hevði tað verið eitt sindur frægari.

Men tað, sum gjørdi, at eg settist aftur, var, at á svørtu atgongumerkjunum til Hotel Føroyar stóð, saman við búmerkinum hjá Asfalt við ljósarari skrivt, skrivað "Miðlahúsið". Ikki eitt orð um Tórshavnar Býráð ella Føroya Banka.

Tað hevði verið uppá sítt pláss, sum býráðslimir eisini vóru kunnaðir um, at Sosialurin skuldi vera við í tónleikatiltakinum, sum Tórshavnar Býráð og Føroya Banki hava stuðlað við tilsamans ávikavist 175.000 kr og 150.000 kr?

### Sosialistiskt »after-party«

Hvussu nógv hevur javnaðarblaðið fíggjað Asfalt við, so ráð vóru til fríbillettir til ballið á Hotel Føroyum?

Tær upphæddir, ið eg sum býráðslimur hava verið við til at játta til Asfaltverkætlanina saman við hinum limunum, hava eina og aleina snúð seg um eitt frálíkt tónleikatiltak við tí endamáli at stovna ein grunn, einum spælistað at frama.

Í lýsingini av málinum um tónleikatiltakið, sum vit viðgjørdu í Mentanarnevndini bæði 8. februar og so aftur 24. mai, stendur ikki eitt einasta orð um, at floksblaðið hjá løgmanni, ið selt varð blaðleiðsluni og Føroya Tele fyri tveimum mánaðum síðani, skuldi vera við í verkætlanini og standa sum sponsor av eini veitslu á Hotel Føroyum hvítusunnuaftan.

Um eg hevði havt minstu hóming av, at býráðið hevði politiskar undirtónar í hesum málinum, hevði eg ikki tikið undir við umsóknunum til tónleikatiltakið við teimum upphæddum, sum søkt varð um.«

## FAKTA

**Stuðlarnir hjá Asfalt vóru:**
- Tórshavnar Býráð
- Føroya Banki
- Faroe Jet
- Miðlahúsið

- Umframt at verða stuðul hjá Asfalt er Sosialurin eisini stuðul hjá Summarfestivalinum og Jóansøkufestivalinum

- Dimmalætting er stuðul hjá G! Festivalinum og Mjús

- Beate L. Samuelsen er útbúgvin journalistur. Hon hevur síðani 2000 verið býráðslimur fyri Sambandsflokkin í Tórshavnar Býráð. Hon starvast sum journalistur á Dimmalætting, har hon í nøkur ár var ábyrgdarblaðstjóri. Hon er eisini ein av trimum høvuðspartaeigarum í P/F Dimmalætting